gult cyan magenta svart




# Tryggingarfelagið Føroyar ynskir ÍF tillukku við sigrinum í steypafinaluni




TRYGGINGARFELAGIÐ
FØROYAR
HØVUÐSSTUÐUL

Sosialurin - 311820


gult cyan magenta svart



# Influensan herjar í Vestmanna



*Skúlastovurnar í Vestmanna Skúla hava verið meira enn hálvtómar í longri tíð*

*Mynd: Jens K. Vang*

**– Eg veit ikki um tað nakrantíð er komið fyri fyrr, at so nógvir næmingar hava verið burturi vegna sjúku í senn, sigur Jóannes Fonsdal, skúlastjóri í Vestmanna skúla**

INFLUENSAN

*Turið Kjølbro*

Ógvusliga influensan, sum hevur herjað kring landið í fleiri vikur, ger rættiliga vart við seg í Vestmanna skúla í hesum døgum. Serliga framhaldsdeildin í Vestmanna skúla er hart rakt. Hósdagin og fríggjadagin í farnu viku vóru bert 22 av 90 næmingum í teim 5 framhaldsflokkunum í skúla. Teir 22 næmingarnir vóru í skúla nakrar tímar og fóru síðani heim. Í gjár, mánadagin, vóru 5 lærarar sjúkir og helmingurin av næmingunum í tí eina áttanda flokkinum og 10. flokki framvegis sjúkir. Hin 8. flokkurin fekk frí, tí allir lærararnir hjá teimum vóru sjúkir. Báðir 9. flokkarnir fóru í starvsvenjing mánadagin. Hvussu nógvir av næmingunum í 9. flokki eru komnir fyri seg aftur, vita vit ikki.

– Hetta er ein rættiliga serlig støða. Eg veit ikki um tað nakrantíð er komið fyri fyrr, at so stórt tal av næmingum hava verið burturi vegna sjúku í senn. Undantakstøða er tað kortini ikki, her er eingin panikkur, tí vestmenningar eru eitt róligt fólkaslag, sigur Jóannes Fonsdal, skúlastjóri í Vestmanna.

Yngru næmingarnir í Vestmanna skúla hava ikki verið so hart raktir av sjúku sum teir eldru. Ikki enn í øllum førum.

Í Vestmanna skúla eru 230 næmingar og 22 lærarar.

## Fiskaarbeiðið darvað

Eisini fiskavirkini, Atlantis og Føroya Fiskavirking í Vestmanna hava verið darvað av influensuni. Í síðstu viku vóru 11 arbeiðsfólk sjúk á einari vakt, sum telur 40 fólk, á Fiskavirking.

– Vit máttu steðga einari framleiðslu, tí so nógv fólk vantaðu, sigur Anni Egholm, arbeiðsforkvinna á Fiskavirking.

Skúlanæmingar í Vestmanna arbeiða aftaná skúlatíð, men eingin teirra var sum vera man til arbeiðis í síðstu viku. Eisini Anni Egholm heldur, at influensan herjar serliga nógv í ár.

– Í vetur hava ógvuliga nógv fólk verið sjúk, men eg veit ikki um, at tað nakrantíð fyrr hava verið so nógv fólk sjúk í senn sum í síðstu viku.

Á Atlantis er støðan kortini ikki so ring. Eini 15 fólk arbeiða har.

– Onkur hevur verið sjúkur, men tað hevur kortini ikki verið so galið. Einir 6 skúlanæmingar arbeiða her, men eingin teirra var til arbeiðis í síðstu viku, sigur Jákup Oluf Hansen, stjóri á Atlantis.

# Limaskap í ICCAT við kvotu

**– ICCAT sleppur ikki at stýra okkum, og vilja teir hava okkum sum lim skal kvota fylgja við, sigur fiskimálaráðharrin Jørgen Niclasen eftir at hava fingið hvassorðað bræv frá ICCAT**

*Ólavur í Beiti*

Vanligt er at Fiskimálastýrið fær bræv frá tunfiskafelagsskapinum ICCAT, men helst ongantíð hevur Fiskimálastýrið fingið so hvassorðað bræv sum nú síðan tunfiskiskapurin tók seg upp í føroyskum sjógvi, og føroysk skip fóru at fiska tunfisk í altjóða sjógvi.

ICCAT felagsskapurin krevur, at Føroyar gerast limur í felagsskapinum, men hetta skal verða limaskapur uttan nakra kvotu. Men fiskimálaráðharrin Jørgen Niclasen fer at svara ICCAT, at gerast Føroyar limur í felagsskapinum, so skal kvota fylgja við.

## Ikki vestanfyri

– Vit eru í somu støðu sum Ísland og vit hava eisini avtalað landanna millum at vit skulu standa saman í hesum máli, sigur Jørgen Niclasen. Og leggur aftrat, at Fiskimálastýrið fer ikki at nokta skipunum at fiska tunfisk í føroyskum sjógvi og síðan at fylgja tunfiskinum í altjóða sjógv, út í Eysuratlantshavið.

– Men ætlanin er ikki, at skipini skulu royna í Vesturatlantshavinum nú, sigur Jørgen Niclasen og sipar sostatt til uppdeilingina av Atlantshavinum hjá ICCAT, har USA og Japan hava kvotu vestanfyri, og europeisku londini og USA og Japan hava kvotu eystanfyri.

Seinastu árini hevur ICCAT sent Fiskimálastýrinum átalur, men ikki áður hevur orðalagið verið hvast, men sum skilst á Jørgen Niclasen, so eru hvørki føroyingar ella íslendingar at vika í hesum spurningi um at fiska á egnum sjóøki.

# Norðmenn ala hýsu

**Í Noreg hava teir nú roynt at ala hýsu, og royndirnar vísa, at hon er lættari at fáa at vaksa enn toskur, og hon trívist betur í kørum og nótum**

Tað er havgranskingarstovan í Austevoll, skrivar Vinnuhúsið, sum hevur gjørt royndir við hýsu, og fyrstu royndirnar eru væleydnaðar. Byrja var við rognum undan villari hýsu og fyrsta yngli fingu teir í fjør vár.

Fiskurin er nú bæði í kørum á landi og í aliringum, fyri at kanna munin á vøkstrinum.

Hýsuyngli hevur víst seg at trívast væl betur enn royndirar við toski. Tað tekur nógv betur føði til sín, veksur skjótari, og man kann byrja við turrfóðri fyrr enn royndirar við toski hava víst.

Kanibalisma hevur ikki víst seg at vera ein trupulleiki, sum hjá torski, vísa royndirnar.

## Eisini aðrastaðni

Arbeitt verður við at fáa nokk av lívfiski og at fáa hann at gýta tvær ferðir um árið.

Roynt verður at at ljósviðgera lívfiskin, fyri at fáa heystyngul. Hetta hevur víst seg at virka hjá torski, á sama hátt sum vanligt er innan laksaaling.

Verður hugt at hýsuprísinum, er tað tó langt ávegis at gera slíka aling til ein handilssligan vinnuveg. Royndir við hýsualing eru tó eisini ávegis í øðrum londum, sum USA, Canada og Stórabretlandi.

# Flest virkir í Suðurstreymoy

**Verður hugt at, hvussu føroyska vinnan geografisk er spjadd yvir landið, má ásannast at útgerðarhavnin kemur at liggja í einum øki við nógvum vinnuligum virksemi**

Nógvir faktorar hava ivaleyst verið vigaðir, tá vali fall á Runavík og hesi feløg: Havnaviðurskiftir, uppland, prísur o.a. At oljufeløgini valdu eina loysn við føroyskum feløgum við róðri, er eisini í trá við andan í lógarkarminum og teimum ynskjum um føroyska vinnuliga luttøku, sum vinnan hevur lagt stóran dent á, skrivar Vinnuhúsið.

Út frá einum vinnuligum sjónarmiði kann sigast, at skuldi føroysk vinna fáa størst møguligt gagn av útgerðarhavnini, skuldi hon helst liggja høgliga fyri hjá flest møguligum virkjum.

Hóast alt hevur fjarstøða nakað at siga. Hyggja vit eftir, hvar tey 141 virkini liggja, sum eru skrásett í oljuáhugabólkinum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag, so er støðan henda: Suðurstreym 71, Norðstreym 5, Vágar 9, Eysturoy 30, Norðoyggjar 14 og Suðuroy/Sandoy 12.

## Tyngdarpunkt

Tað kann soleiðis sigast, at útgerðarhavnin liggur í einum av vinnuligu tyngdarpunktinum í landinum. Fyri virkir í Klaksvík liggur Runavík høgliga fyri, og fyri virkir í Vágum ella Norðurstreymi, er ikki nógvur munur á Havnini ella Runavík. Trupla ferðasambandi ger, at fyri virkir í Suðuroy vil alt uttanfyri oynna vera óhøgligt.

Verður hugt eftir, hvat slag av virksemi talan er um sæst, at nógvur verkstaðsídnaður, smiður og slíkt er í Eysturoy, meðan tænastuvinna er rættuliga dominerandi millum virkini í Suðurstreymi, skrivar Vinnuhúsið.